

# Ársins neyðardýr á Tjóðpallinum

Ongin skomm ella neyð er ov stór, um bara hon kann skaffa tær nakrar minuttir í sjónvarpinum í nýggja leikinum á Tjóðpallinum. Leikurin »The Danny Crowe Show«, rakar beint í øgiligu trongdina at gerast kendur – kosta hvat tað kosta vil. Jú størri skomm, neyð ella perversari atburð, tú hevur at bjóða, jú størri er kjansurin fyri at gerast stjørna í sendingini. Hjá Danny Crow savnast øll tey fátæku, tey ovurfeitu, tey skeivt skurðviðgjørdu tey misbrúktu - enntá tey sum eru um at doyggja av krabbameini møta heldur enn fegin upp í sendingini. Leikarar eru Beinta Clothier, Kristina O. Sørensen, Ria Tórgarð, Bárður Persson, Hjálmar Dam og Hans Tórgarð. Leikstjórn og pallmynd hevur Mikkel Harder Munck-Hansen staðið fyri. Frumsýning av leikinum »The Danny Crowe Show«, verður á Meiarínum mikudagin 24. mars klokkan 19.30.





*Hesi vóru í landsroynd og fingið frugt tá ið royndin var av*

## Gott at ganga í skúla

Vit prátaðu við nakrir næmingar úr 8. og 9. flokki. Og teimum dámdi væl at ganga í skúla.

Eina grundin til tað er, at tey hava nógvir vinir her. Tey sum búgva í Klaksvík ganga ikki so høgt uppí at møta til tíðina. At vera eitt sindur forsein/-ur bilar ikki. Tey sum búgva norðanfyri tunlarnar á Borðoynni koma við bussi hvønn morgun um 8 tíðina.

Nøkur ætla sær á valskúla ella miðnámsskúla. Ætlaninar eru ymiskar.

## Hin besti skúlin

Vit tosaðu eisini við 28 ára gamla Høgna á Reynatrøð, sum starvast sum lærari við skúlan á Ziskatrøð. Høgni hevur arbeitt á skúlanum í 4 ár sum lærari, øll árini á Ziskatrøð.

Honum dámar væl at skriva og arbeiða við fólki. Men hann trívist rættliga væl á Ziskatrøð, betri enn tá ið hann byrjaði fyri 4 árum síðani.

Um hann ikki hevði endað sum lærari á fólkaskúlanum, hevði hann lisið víðari sum lærari á einum miðnámsskúla ella okkurt víðvíkkandi skriving.

Vit spurdi hann, hví hann valdi júst Ziskatrøð?

- Her er ein stórur skúli, og tann besti skúlin. Her trívist er væl, svarar hann brosandi.